# la far í terapi!



*Í løtuni fara Willieboys og Grýlan kitlandi og klórandi inn undir húðina á áskoðarnum í Sjónleikarahúsinum*

– Týðingin hjá Matras er framúr góður skaldskapur, men hon er ikki skrivað til at vera borin fram á palli. Vit høvdu brúk fyri eini týðing, har orðini kennast so natúrlig í munninum og liggja so tætt at andanum hjá William sum møguligt. Tað er tað, eg havi roynt at gjørt, sigur Bárður, og nevnir sum dømi byrjanina av tekstinum, har tað stendur at grýlan var "en sær eksistens"

– "Ein løgin skapningur" hevði ivaleyst verið eitt upplagt boð, men so eru bæði William og flogið í setninginum eisini horvin. Mítt boð er "ein serur eksistensur", tí soleiðis ljóðar William í mínum oyrum, og tí grýlan er ein eksistentiell og universiell lívtreyt, sum tað ikki er pláss fyri inni í einum "skapningi", sigur Bárður og leikstjórin nikkar

– Bárður hevur varveitt tann heilt serliga poesiin og ikki minst tað sansaliga myndamálið í tekstinum, og tað hevur verið heilt avgerandi fyri meg sum leikstjóra. Okkara Grýla er ikki ein intelektuell, málslig vigan fyri ella ímóti skeivum og røttum orðum sambært orðabókini. Hon er í allar mátar ein sansalig uppliving sum má – ja upplivast ...

Grýlan er óhóskandi fyri børn undir 16 ár.

út úr einum av leiklutunum.

– Onkur heldur danskaran vera eitt sindur láturligan, men eg haldi hann vera ótrúliga áhugaverdan, tí hann gav mær møguleika at geva leikinum ein vinkul afturat, sum onkusvegna eisini er bygdur inn í søguna hjá William, greiður Bárður frá.

Danskarin sær grýluleikin sum eitt mentanarligt fyribrigdi, sum hann uttan iva veit alt um í teoriini, men samstundis er hann bebbaræddur fyri tí og smoyggir sær stillisliga burtur, tá jørðin byrjar at brenna undir honum. Í so máta er hann ein rættiliga ítøkilig ímynd av tí, sum uppá fleiri mátar er kjarnin í søguni: tvídrátturin millum tað syndafulla og tað moralskt "rætta", millum myrkursins og ljósins kreftir, millum tað lívgevandi og tað oyðileggjandi. Grýlan er í millum mangt annað ímyndin av eini neyðugari afturvendandi útreinsan, men áðrenn hon kemur á botn, má alt tað syndafulla og ljóta fram í ljósið onkusvegna.

– Í so máta eru talk-showini hjá Ricki Lake eitt frálíkt dømi um ein modernaðan grýluleik av ringasta slag. Fyrr gingu tey grýlu, í dag ganga vit í terapi - orsøkin er uttan iva umleið tann sama. Um úrslitið eisini er tað, kunnu fólk sjálvi meta um við at koma oman í sjónleikarahúsið okkurt kvøldið, sigur Bárður.

### Óðamannaverk

Men hví fór Bárður Persson undir at týða Grýluna av nýggjum, heldur enn at brúka gomlu týðingina hjá Christiani Matras?

– Tað er ein góður spurningur, tí eftir mínum tykki er tað óðamannaverk yvirhøvur at royna at týða William Heinesen. William hevur sítt heilt egna william-mál, sum tað ikki ber til at endurskapa, uttan at røddin hjá William hvørvur, sigur Bárður, sum ikki gongur og billar sær inn, at hann hervið hevur endurskapa eina fullfíggjaða, føroyska útgávu av upprunaligu søguni.